# Hjá Jógvan Weihe fæst tað mesta

**Fyritøkan P/F Jógvan Weihe helt til við Staravegin á Hálsi í Havn, men flutti fyri tíð síðani í nýggj og egin høli í Stiðjagøtu**




P/F Jógvan Weihe varð bleiv stovnað í 1991. Hetta var í ringastu tíð, meðan samfelagskreppan herjaði. Tað vóru tey bæði Hildubjørg og Jógvan Weihe sum stovnaðu fyritøkuna.

Jógvan er útbúgvin skrivstovumaður. Hann byrjaði í Landshandlinum í Havn í 1960, og frá 1963 arbeiddi hann sum ferðandi sølumaður hjá Landshandlinum. Hann arbeiddi eisini sum ferðandi sølumaður á heilsøluni hjá Kartni Winther.

Jógvan hevur eisini ferðast nógv kring landið fyri sína egnu fyritøka, og er hann helst tann føroyingurin, sum hevur arbeitt longst sum ferðandi sølumaður.

Fyritøkan selur so gott sum allar vørur sum t.d. fóður, fiskireiðskap til frítíðarfiskimenn, og alt til urtagarðsrøkt. Tá morðsnigilin byrjaði at gera um seg í Føroyum, vóru tey t.d. fyrst við Ferramol, sum hevur bøtt munandi um hendan snigilstrupulleikan. Sum nakað nýtt selur fyritøkan nú eisini arbeiðsklæðir, oljuklæðir, stivlar og annað til arbeiðs- og fiskimenn.

Fimm fólk starvast í nýggja bygninginum í Stiðjagøtu, ið er upp á tilsamans 900 fermetrar, har ein partur er í tveimum hæddum. P/F Jógvan Weihe er bæði heil- og smásøla. Handilin er opin gerandisdagar frá kl. 8.00-17.30 og leygardag frá 9.00-14.00.

Men nú jólini nærkast í stórum, merkir hetta sjálvsagt handilin, og nær opið er.

Og er ein í iva um jólagávurnar, so er góður íblástur at fáa, um ein vitjar innar hjá P/F Jógvan Weihe.

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

















